# FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-152_3
dags. 11-10-2011

**Innlendismálaráðið**
**Att.: Guðrun Mortansdóttir Nolsøe**

Teldupostur: sami

***Viðv.: Tygara 11/00543-7, uppskot til lógarbroyting í ferðslulógini (/ATV)***

Føroya Kommunufelag hevur, tann 13. septembur, móttikið uppskot til broyting í ferðslulógini viðvíkjandi lendisakførum. Stýri felagsins hevur viðgjørt málið tann 11. oktobur, og hevur hesar viðmerkingar:

Fartoyið verður mett at vera so óstabilt, at ferðslumarkið eigit í mesta lagi at vera 30 km um tíman í bygum øki, og í óbygdum øki 50 km.

Eigarar av fartoyinum eiga at kunna vísa á viðkomandi vinnuligt virksemi. Hetta fyri at avmarka talið av hesum slag av fartoyum.

Um talan kann bliva um stuttleikakoyring í lukkaðum øki (forlystelsespark), har talan er um vinnuligt virksemi hjá eigaranum av akførunum, skal kommunan, sum gevur loyvi til virksemið, kunna áseta reglur, sum taka atlit til vernd av nátturuni í økinum.

Somuleiðis, eigir ferðavinnan, sum bjóðar túrar við lendisakførum út í náttúruna, at hava góðkendar leiðir at ferðast eftir.

Tikið verður undir við viðmekingunum til avleiðingarnar av hesum slagi av ferðslu og avmarking av henni í haga, privatum ella almennum, har viðkvom øki eru við fugli og plantum eru. Neyðugt er at hava reglur, sum ger tað møguligt hjá fútanum at handhevja.

fyri felagið

Sveiney Sverrisdóttir, skr.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo